# UM



» Og so gera vit eisini tær vælsmakkandi frikadellurnar og fiskabollarnar. Ja, tú veit: »Alt godt fra havet«

## 2 X 13

Sigrun Sivertsen var bert 13 ára gomul, tá hon fyrst fór til arbeiðis á fiskavirkinum í Norðdepli.

Nógv arbeiði var tá, og tey sum vildu, fingu beinanvegin arbeiði á virkinum.

– Eg fór úr skúlanum tá, og fekk arbeiði, greiðir Sigrun frá.

Tá varð alt skorið við hond, í mun til í dag, har maskinur gera ein stóran part av hesum arbeiðinum.

– Nú er tað nógv elektriskar greiðir, sigur Sigrun, sum hevur arbeitt á Norðfra seinastu 13 árini.

**ROYNDIR**

*– Eg havi roynt alt arbeiðið á virkinum, sigur 56 ára gamla, Sigrun Sivertsen, sum í dag virkar sum arbeiðsformaður á Norðfra*

*Mynd: Jens Kristian Vang*